## Norðurlond ganga undan

Danmark, Noreg, Svøríki og Ísland eru millum tey fremstu í OECD, tá tað snýr seg um at viðgera blóðtøppar í hjartanum ella heilanum. Tað sæst í einari frágreiðing, sum samanber heilsustøðuna hjá fólki í teimum 30 OECD-londunum, og sum danska heilsumálaráðið hevur kunngjørt. Tølini vísa, at støðugt færri danir doyggja av hjartasjúkum, og frágreiðingin vísir eisini, at framstig eru hend á krabbameinsøkinum. Eitt nú er Danmark tað av OECD-londunum, sum hevur havt ta størstu framgongdina innan bróstkrabbaviðgerð síðani 2002.



## Størri hvalakvotu

Norsku myndugleikarnir ætla at loyva teimum norsku hvalabátunum at veiða munandi fleiri sildrekar næsta ár enn í ár. Í ár høvdu bátarnir loyvi at veiða 885 sildrekar, men bátarnir veiddu bara 484. Kortini hevur Lisbeth Berg Hansen, fiskimálaráðharri, sagt, at ætlanin er at økja kvotuna upp í 1.286 hvalir næsta ár. Sambært einum embætismanni í fiskimálaráðnum er talan um at flyta avlopið av kvotuni í ár til næsta ár. Norges Råfisklag sigur, at hóast myndugleikarnir hava økt kvotuna tey seinastu árini, er veiðan minkað, tí eftirspurningurin eftir tvøsti hevur verið víkjandi.

# Tey lágløntu skulu druknast í skatti

**– Fyri at bjarga búskapinum og minka føroyska útlátinum av veðurlagsgassum, verða tey lágløntu díkt undir í skatti ímeðan tey vælbjargaðu bara skulu sleppa at betala seg burtur úr øllum, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag**

SKATTAPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ingeborg Vinther vil ikki hoyra talan um, at vanlig fólk skulu knokkroytast í skatti ímeðan tey vælbjargaðu bara skulu kunna betala seg burtur úr øllum*

– Hetta fara vit aldrin at góðtaka.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag er greið yvir, at bæði hennara fegna fakfelag og øll onnur fakfeløg hjá teimum lág og miðalløntu, standa fyri eini veldugari avbjóðing.

Og tann avbjóðingin er at forða fyri, at fólk við lágari og miðal inntøkum, verða druknað í skatti, sum hon málber seg, samstundis sum tey vælbjargaðu bara kunnu betala seg burtur úr øllum.

### Skatturin hækkast

Nú tað treingir saman um fíggjarliga og búskapurin hevur stórt hall, eru røddir farnar at ljóða um, at tað er neyðugt at breiðka skattagrundarlagið, sum tað so hábærsligt eitur.

Tey, sum meint verður við, er, at skattatrýstið skal økjast fyri at fáa alt at hanga saman.

Í hesum sambandi hava politikarar tosað um, at tað er neyðugt at leggja avgjøld á alt møguligt fyri at fáa meiri í landskassan.

Fyri at fáa tað at glíða lættari niður, verður tað í summum førum kalla umhvørvisgjøld, sum vit skulu betala fyri at brúka olju og annað umhvørvisdálkandi evni og sum vit skulu betala fyri at keypa bilar, sum dálka meiri enn eitt vist.

Ein, sum er heitur talsmaður fyri at breiðka um skattagrundarlagið, er sjálvur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard og í hesum sambandi havur hann í almennu kjaki í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum beinleiðis nevnt, at ongastaðni rundan um okkum er bensin og diesel til bilar so bíligt sum í Føroyum og tað er týðuligt, at hetta er eitt øki, har hann kundi hugsað sær at breiðka skattagrundarlagið, sum hann málber seg.

### Lágløn betala meir

Men hesum er fakfelagssamskipanin, Samtak, púra ósamt í. Samtak er ein samstarv ímillum trý stór fakfeløg, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Fiskimannafelag.

– Húsarhaldini við lág- og miðalinntøkum eru rættiliga illa sperd fíggjarliga og tí eiga politikararnir ikki at leggja enn størri byrðar á tey, sigur Ingeborg Vinther í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon vísir á, at frammanundan hava vit næsthægsta skattatrýst í allari verðini, so at díkja enn meirni skatt á vanliga fólki, átti ikki at komi nøkrum til hugs.

### Vælbjargað kunnu bara betala

Hon sigur, at tí er tað heilt burturvið, at seta umhvørvissgjøld í gildið, sum tosað hevur verið um.

Hon staðfestir, at avgjøldini venda tann tunga endan niðureftir, tí tað er sjálvandi nógv tyngri hjá fólki við lág- og miðalinntøkum at betala avgjøld enn tað er hjá vælløntum fólki.

– Sostatt eru avgjøld heilt ótrúliga ósosial og ósolidarisk og tað er ein skattapolitikkur, sum vit aldrin fara at taka undir við, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at hetta fer at føra við sær, at fólk við lág- og miðalinntøkum verða druknað í skatti.

– Men tey, sum hava góð ráð, kunnu framvegis liva og láta, sum teimum lystir, tí hjá teimum ger hvørki frá ella til um ein litur av diesel ella bensini kostar eina krónur meiri ella minni.

– Hinvegin hevur ein króna meiri ella minni stóran týdning hjá fólki við lægri inntøkum og sostatt koma vit í eina støðu, har tey verða knokkroytt í skatti ímeðan tey við góðari inntøku, kunnu betala seg burtur úr øllum, uttan at tað ger nakran sum helst mun.

### Loysi veruligu trupulleikarnar

Ingeborg Vinther sigur, at politikararnir skuldu heldur loyst teir veruligu trupulleikarnar og tað er, at teir hava gjørt almennu fyrisitingina nógv størri, enn eitt lítið samfelag, sum okkara, maktar.

Samstundis verður fiskiríkidømi fyri milliónir latið reiðarum fyri onki at skalta og valta við, sum teimum lystir. Og tá ið teir ikki tíma meir, kunnu teir selja hela gávuna, teir fingu frá landinum og stinga vinningin í lumman, og tað hevur í ávísum førum verið hundraðtals milliónir.

Samstundis átalar forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag politikararnar harðliga fyri at teir ikki hava brúkt tey góðu árini til at laga almennu útreiðslurnar til tær verru tíðirnar, sum máttu koma og til tær inntøkuskerjingar, sum hava verið við niðurskornum blokki.

**…stóri trupulleikin í okkara fíggjarpolitikki er, at inntøkusíðan á fíggjarlógini er alt ov veik....Hægsti marginalskattur hjá okkum er yvir 60% í teimum kommunum við hægsta skattaprosentinum. So henda skrúvan kann neyvan skrúvast so nógv meira, uttan við tí avleiðing, at fólk flyta burtur……**

**…..Tað verður tí eisini neyðugt at breiðka um skattagrundarlagið, og tað vil uttan iva gera skattaskipanina meira sosiala og samhaldsfasta. Her hugsi eg serliga um møguleikan, sum verður brúktur í øðrum londum eitt nú við skatting av tilfeingi, sum tað almenna letur út ókeypis, og sum onnur kunnu vinna stóran pening av. Men eg hugsi eisini um tað órímiliga í, at vit ikki tora at skatta vanligan vinning, sum samfelagið hevur skapt, og eg hugsi um umhvørvisgjøld.**

***Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum og formaður Javnaðarfloksins, í formansrøðu síni á landsfundi floksins 7. november 2009***

# Ongin møguleiki fyri ognarskatti í Føroyum

**Politikarar í Føroyum eiga ikki so frægt sum taka spurningin um ognarskatt til viðgerar, tí tað kann ikki koma upp á tal, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag**

SKATTAPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Ognarskattur kann slett ikki koma upp á tal í Føroyum.

Tað staðfestir Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

Sum tað sæst í aðrastaðni her á síðuni, er forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag hart ímóti ætlanini hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum at seta fleiri avgjøld í gildi fyri at breiðka skattagrundarlagið.

Í hesum sambandi hevur spurningurin eisini verið nevndur um at seta ognarskatt í gildi í Føroyum.

Men tað er ein spurningur, sum politikarar ikki so frægt sum eiga at taka upp til kjak, staðfestir forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

– Tað kann aldrin koma upp á tal í Føroyum, tí tað letur seg ikki gera, sigur hon.

Hon heldur, at bæði politikarar og búskaparfrøðingar hava lyndi til at gloyma, at tað er eitt heilt annað bústaðarmynstur í Føroyum enn tað er í øðrum londum.

– Í Føroyum hava fólk onki val enn at hvørt húski byggir síni egnu hús, tí her hevur ongin íbúðarbygging verið, uttan kanska í Havn, har nakrar fáar íbúðir hava verið seldar fyri okurspírs.

Samstundis hava fólk betalt skatt av hvørjari krónu, tey hava forvunnið og sum tey byggja húsini fyri.

– Úrslitið er, at fólk stríðast við rentur og avdráttur heilt upp í pensjónsaldurin, áðrenn tey eiga húsini. Og tað er nógv fyri, at ávísir politikarar og búskaparfrøðingar ikki tola at síggja, at eldri fólk skulu kunna eiga síni dýrt goldnu hús, uttan at tosa um at leggja skatt á tey einaferð afturat, tá ið húsini eru goldin.